# Kend og minni kend andlit og onkur tómur stólur

**Tvey av limafeløgunum vóru ikki umboðað á FSF aðalfundinum. Nógvir gamlir kenningar sóust, men hjá fleiri feløgum vóru tað aðrir enn formenninir, sum vóru á fundi**



FSF AÐALFUNDAR UMBOÐINI

*Jóannes Hansen*

Á aðalfundinum hjá Fótbóltssambandinum leygardagin vóru tað tvey av teimum 22 limafeløgunum, sum ikki vóru umboðað. Tey vóru Nólsoyar Ítróttarfelag, NÍF, sum annars hevur boðað frá, at teir ætla sær at taka lut í kappingini í ár, og Eiðis Bóltfelag. EB og Streymur eru felags um fleiri lið. Men í FSF høpi eru tað tey bæði móðurfeløgini hjá EB/Streymi, EB og Streymur, sum eiga limaskapin. Streymur var umboðað á fundinum, men tað var EB ikki.

Oftast plagar tað at vera soleiðis, at feløgini eru umboðað av formanninum og so onkrum nevndarlimum ella venjarum aftrurat. Sjálvandi kann tað koma fyri, at tað ikki ber øllum til at møta, men hesa ferð var tað merkisvert, at fleiri formenn ikki vóru á ársaðalfundinum.

Millum teirra, sum plaga at vera, og sum aftur vóru hesa ferð, vóru eitt nú Niclas Davidsen úr B68, Tórálvur Stenberg úr AB, Birgir Enghamar úr HB og Jákup Mortensen úr NSÍ.

Onkrir formenn, sum í mong ár hava verið við til at mynda teirra felag, vóru ikki á fundinum leygardagin. Ein teirra var Kristian á Neystabø, sum í eitt mannaminni hevur verið formaður í B36. Hann hevur sitið í nevndini saman við Kjartani Mohr, kassameistaranum, sum taldist millum B36 umboðini hesa ferð.

Kristian er framvegis B36 formaður. Felagið hevur aðalfund í annað kvøld. Tað hevur ljóðað, at Kristian ætlar at leggja frá sær á aðalfundinum hesa ferð. Um hesi tíðindini fara at gerast til veruleika fæst at vita eina ferð mikukvøldið. Tað hevur áður ljóðað, at Kristian skuldi fara frá, men hann hevur kortini verið drúgvur.

KÍ formaðurin, Gestur Hovgaard, var heldur ikki at síggja á aðalfundinum. Í staðin var tað formaðurin í fótbóltsdeildini, Símun Gullaksen, sum var einsamallur at umboða stóra felagið í Klaksvík. Gestur er framvegis KÍ formaður, og hann verður eisini formaður í Klaksvík í hvussu so er eitt ár afturat. KÍ hevur aðalfund í hesi vikuni. Tveir starvsnevndarlimir - Karl Birgir Isaksen og Nichels Lützen - standa fyri vali.

Einki var heldur at síggja til arbeiðssama TB formannin, Sofus Laðanberg. Hann er framvegis TB formaður. Jóan Petur Olgarson, sum hevur verið við leingi, og sum er formaður í ungdómsdeildini, var einsamallur um at umboða aldursforsetan í føroyskum fótbólti á aðalfundinum.

Tað hevur ljóðað, at hann ætlar at taka seg aftur úr fremsta politiska fótbóltssessinum á Tvøroyri, tá ið TB fer at hava aðalfund næsta leygardag. Eingin roknar við, at Sofus fer at taka seg heilt aftur við arbeiðnum at halda elsta fótbóltsfelagnum í Føroyum millum tey fremstu, og tað eru tey, sum siga seg ivast í, um nú Sofus fer at leggja formanssessin frá sær seinni í hesi vikuni. Sagt verður, at tað fer at vera stórur smeitur fyri TB, um Sofus fer at taka seg aftur.

B71 formaðurin, Eli Hentze, var heldur ikki á aðalfundinum. Einsamalla umboðið fyri felagið var nevndarlimurin og samskiparin Ragnar Fossdalsá. Einki hevur kortini verið at hoyrt um, at B71 formaðurin ætlar at leggja frá sær - hvørki sum formaður ella spælari!

Borð vóru eisini til umboð fyri ÍSF, venjarafelagið og fótbóltsdómarafelagið. Umboð fyri hesar partar plaga at vera á fundinum, men eingin teirra var í FSF húsinum leygardagin.

# Ikki eitt orð um nýggju kappingina

**Men feløgini søgdu nei til uppskotið hjá FSF um at avtaka uppflytingardystirnar, eftir at feløgini, sum hava teirra besta lið í næstbestu deildini, høvdu givið til kennar, at tey vóru ímóti, at skipanin varð broytt**

LANDSKAPPINGIN

*Jóannes Hansen*

Tað hevur ikki verið frítt, at eitt sindur av undran og kanska eisini misnøgd hevur verið at sæð við ætlanirnar og uppskotið hjá Fótbóltssambandinum um at víðka um landskappingina í bestu deildini úr 18 og upp í 27 umfør og harvið at fara undir landskappingina síðst í mars og at halda fram inntil síðst í oktober.

Málið var ikki á skránni á aðalfundinum leygardagin. Men tað vóru fleiri, sum út frá orðaskiftinum undan aðalfundinum høvdu roknað við, at málið fór at verða reist. Soleiðis var tað ikki. Tann einasti, sum nevndi broyttu kappingina í bestu deildini, var FSF formaðurin Óli Holm. Í munnligu frágreiðingini tók hann soleiðis til:

– Tað eru sjálvsagt ymiskar áskoðanir, um leisturin er tann rætti, um tíðin er búgvin, og um broytingin er nóg væl umhugsað, men vit mugu - fyrr ella seinni - taka eina støðu. Føroyskur fótbóltur hevur ment seg so mikið nógv seinast árini, at tað er trupult at síggja, hvussu vit koma longur ávegis, um vit ikki broyta grundleggjandi viðurskifti, segði FSF formaðurin og sipaði ivaleyst til øktu landskappingina.

Tað var møguleiki at gera viðmerkingar til formansfrágreiðingina og harvið til tað, sum varð sagt um broyttu landskappingina. Men eingin tók orðið í hesum sambandinum.

Tá ið tað snúði seg um steypakappingina, sum nú verður broytt frá bólkaumfari og til cup kapping frá fyrsta umfari, segði formaðurin soleiðis:

– At broyta steypakappingina tykist mest sum ein formalitetur, tí flest øll eru samd um, at fóru vit ikki aftur til cup skipanina, vildi áhugin fyri kappingini fánað burtur.

### Tey næstbestu søgdu nei

FSF nevndin hevði skotið upp, at møguleikin hjá næstaftastu liðunum at flyta niður og hjá teimum næstbestu at flyta upp skuldi strikast. Skipanin við uppog niðurflytingardystum hevur verið galdandi síðani í 1995, og FSF nevndin helt royndirnar vera, at tað bara hevur verið í hendinga førum, at liðið í lægru deildini hevur megnað at koppa liðnum úr ovaru deildini. Hetta saman við at nevndin helt tað hava verið torført at finna dystardagar var orsøkin til, at FSF nevndin bað feløgini samtykkja at strika skipanina.

Men hesum tóku feløgini ikki undir við. Serliga vóru tað feløgini, sum nú hava sítt besta lið í næstbestu deildini, og sum kunnu roknast at teljast millum teirra, ið fara at stríðast um uppflytingina, sum góvu til kennar, at tey vóru ímóti at broyta ásetingarnar.

AB, B68, FS Vágar og B71 talaðu ímóti uppskotinum, og tað endaði við, at FSF nevndin tók uppskotið aftur.